Tórshavn – Juli 2024

# VÆLKOMIN Á SØGU- OG SAMFELAGSDEILDINA (SSD) Á FRÓÐSKAPARSETRINUM

Góði nýggi lesandi á Master í Samfelagsvísindum og stjórnmálafrøði ella í Søgu.

Hjartaliga vælkomin á deildina.

Her er ein stutt kunning í sambandi við lestrarbyrjanina á Søgu- og samfelagsdeildini.

**Innleiðsla**
Lestrarárið byrjar mánadagin 19. august kl. 9.00 í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum við felags innleiðslu fyri øll nýggj lesandi á Setrinum. Kl. 11.15 sama dag verður farið á Søgu- og samfelagsdeildini.

Innleiðslan á Søgu- og samfelagsdeildini (Jónas Broncksgøta 25) er fyri øll lesandi, men hon er tillagað tykkum, sum byrja á Masterlesnaði. Tað hevur stóran týdning, at tit luttaka í hesi innleiðslu, so tit fáa neyðugu kunningina um lesturin, mannagongdir, kunningarskipanir, rættindi og skyldur, reglur og annað, ið er viðkomandi fyri tykkara lestur komandi tvey árini.

**Møguligar góðskrivingar**
Viðhvørt hava lesandi tikið skeið á øðrum hægri útbúgvingum, sum tey ynskja at fáa góðskrivað. Um tú heldur teg kunna fáa okkurt góðskrivað fyri skeið, sum er á skrá í fyrstu lestrarhálvuni, eigur tú at fáa øll neyðug skjøl til vega og senda ein teldupost til lestrarskrivstovuna *lss@setur.fo*. Summarfrítíð kann tó hava við sær, at svar ikki kemur beinavegin. Umsóknir um góðskriving verða viðgjørdar í Lestrarráðnum, sum tekur endaliga avgerð. Vanliga er fyrsti fundur miðskeiðis í august.

**Bøkur at keypa**
Fyri lestrarbyrjan skulu øll lesandi útvega sær hesar bøkurnar:

- *“Reflexive methodology” (2018), 3. útgáva, eftir Mats Alvesson og Kaj Sköldberg.*

- *“Metoder i Statskundskab (2020), 3. útgáva, eftir Kasper Møller Hansen, Lotte Bøgh Andersen og Sune Welling Hansen.*

Umframt hesar báðar bøkurnar skulu **søgulesandi** eisini ogna sær hesa bókina (afturat hinum báðum):

- *“Royndin” (2020) eftir Hans Andriasi Sølvará.*

Allar bøkurnar eru bílagdar og kunnu keypast í Riti og Ráki í SMS í Tórshavn, og tær koma allarhelst til landið fyrst í august mánaði. Hesar bøkurnar hava ikki bara týdning fyri fyrsta semestur, men fyri allan tykkara MA-lestur.

Fyrsta undirvísing í "Vísindaástøði og háttalag á Master" er á skrá mánadagin 26. august kl. 13.00. Undan hesi undirvísing skulu tit lesa tekstin "The Meanings of Methodology", sum er hjálagdur hesum kunningarskrivi.

Master er felagsheiti fyri útbúgvingarnar M.S.Sc. í samfelagsvísindum og stjórnmálafrøði og M.A. í søgu. Um tú hevur bachelor-útbúgving í aðrari útbúgving enn henni, tú nú fert at lesa, er týdningarmikið, at tú lesur grundlesnað um títt útbúgvingarøki undan lestarbyrjan. Niðanfyri eru viðmæli til grundbøkur.

- *Politikkur og umsiting: "Politics" (2019), 5. útgáva, eftir Andrew Heywood.*
- *Samfelagsvísindi: "Grundbog i sosialvidenskab" (2015), onnur útgáva, eftir Bent Greve.*
- *Søga: "Fortiden er ikke hvad den har været" (2001), eftir Knut Kjeldstadli.*

Saman við hesi kunning og áðurnevnda teksti til fyrstu undirvísing er skráin fyri innleiðsluni á Søgu- og samfelagsdeildini hjáløgd.

Vit gleða okkum til at síggja teg.

Vinaliga

Hans Andrias Sølvará
Útbúgvingarleiðari

Erika A Hayfield
Dekanur fyri søgu og samfelagsdeildina

# Skrá fyri innleiðsluna á Søgu- og samfelagsdeildini 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**

Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

Kl. 09.00 Skráseting

Kl. 09.15 Rektarin bjóðar vælkomin

Kl. 09.25 Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin

Kl. 09.30 Tónleikur

Kl. 09.45 Stutt røða

Kl 10.00 Lesandi fáa høvi at vitja básar. (Studni, Betri Banki, Landsbókasavnið, Rit og Rák, Ráð Teirra Lesandi, MFS og onnur verða boðin við)

*Lesandi fara út á deildirnar.*

**Kl. 11.00 Lesandi fara til SSD í Jónas Broncksgøtu 25, mentorar verða til hjálpar at vísa veg**

Kl. 11.15 Dekanurin bjóðar stutt vælkomin og felags myndatøka.

Kl. 12.00 Lesandi fara hvør við sínum útbúgvingarleiðara inn í undirvísingarhølini og bjóða vit eina lætta máltíð. Her fáa lesandi høvi til at heilsa uppá hvønn annan, útbúgvingarleiðaran og onnur, ið hava eitt serligt tilknýti til útbúgvingina. Útbúgvingarleiðarin kunnar um útbúgvingina, umframt krøv og væntanir til tann lesandi. Hetta er eisini ein góð løta at tosa saman og spyrja um møgulig ivamál.

Eisini verður rundsýning í bygninginum og høvi at heilsa uppá starvsfólk.

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

**Mikudagin 21. august**

Dagur saman við mentorum. Útferð til Nólsoyar. Møtast á Bursatanga kl. 9.15
Báturin siglir úr Havnini kl. 9.30, og vit sigla úr Nólsoy aftur kl. 13.00

Havið matpakka við.

**Fríggjadagin 23. august**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 -12.00 | KT-vegleiðing í auluni á Námsvísindadeildini (Frælsið 20) – Skipað verður fyri víðkaðari KT-kunning fyrrapartin av degnum, har tey lesandi fáa høvi at sita við telduni og fáa beinleiðis vegleiðing at rita inn í ymisku skipanirnar, sum verða brúktar í útbúgvingini. |
| Kl. 17.00-20.00 | Felags døgurði í Jónas Broncksgøtu, har vit hugna okkum saman, áðrenn farið verður til SetursSamanShow. |
| Kl. 20.00 | SeturSamanShow  í Reinsarínum |